Fróðskaparsetur Føroya

25. juni 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 9/2004

Tíð: Fríggjadagin 25. juni 2004, kl. 9.00-11.15

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 8/2004 setursráðsfundi 10. juni 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógaruppskotið 2005.** (J.nr. 0015-01365). *Fundarskjøl: Uppskot til umsókn til verandi virksemi, 4 s., uppskot til umsókn menningarætlan, 1 s., framrokning av tørvi 12 s.* MM og AS greiddu frá skjølunum. Eingi nýggj boð eru komin frá Mentamálaráðnum um fíggjarlóg 2005. TS gjørdi vart við, at Føroyamálsdeildin er ónøgd við raðfestingarnar í menningarætlanini, deildin heldur, at eitt málfrøðistarv og eitt hálvt skrivarastarv má raðfestast eisini. Kjak var um menningarætlanina og tørvin á at menna verandi virksemi. Setursráðið skilti boðskapin hjá Føroyamálsdeildini, trupulleikin við ov lítlari manning á ymsu fakøkjunum er á øllum deildum. Setursráðið var kortini samt um í hesum umfari at halda fast við samtyktu menningarætlanina sum leggur dent á nýskapan.
AS ger tilfarið liðugt til at leggja fyri samstarvsnevndarfund 7. juli. Verður sent Mentamálaráðnum beint eftir tann fundin.

4. **Námsskipanir á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0042-01380). *Fundarskjøl: Námsskipan fyri søgu, 7 s., námsskipan fyri stjórnmálafrøði, 6 s., samtyktar á megindeildarráðsfundi 22. juni 2004.* Staðfestar við smærri rættingum. SSS sendir góðkendu námsskipanirnar til Mentamálaráðið til kunningar.

5. **Námsskipanir á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. 0043-01382). *Fundarskjal: Fyribils uppskot til námsskipanir fyri Lívfrøði, Ravmagnsverkfrøði, Teldufrøði.* HPJ greiddi frá støðuni higartil og hvat manglar at gera. Allar námsskipanir verða gjørdar lidnar sum


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

skjótast. Tá tær eru góðkendar av megindeildarráðnum, verða tær sendar setursráðnum at avgreiða millum funda.

6. **Netumsitingin/Netsamstarvið.** (J.nr. 0091-01088). MM og AS greiddu frá samtyktunum í Netráðnum um at loyva flytingini av Netumsitingini til Fróðskaparsetrið at umsita í nýggju KT-tænastuni. Netumsitarin hevur sagt seg úr starvi og tí má lýsast eftir KT-leiðara og teldurøkli samstundis. Samtykt at heita á Knud Simonsen, Eyðun Johansen og Anniku Sølvará um at verða í setanarbólkinum til bæði størvini. Samtykt at seta umsóknarfreistina til hálvan august. SSS samskipar arbeiðið at gera lýsing.
Deildir setursins verða bidnar um at siga upp teldutænastusáttmálarnar áðrenn 1. juli.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundir í Netráðnum 28.5.04, 7.6.04 og 17.6.04.** (J.nr. 0091-00709). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 22.6.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Føroyamálsdeildini 23.6.04.** (J.nr. 0011-00011). TS hevði frágreiðingina við á fundin. Einki at leggja afturat.

**Kunningarmál:**

8. **Heilsulagslýsing landslæknans 2003.**

9. **Árbók Háskóla Íslands 2003 og Ritaskrá Háskóla Íslands 2003.**

10. **Landsroknskapur fyri fíggjarárið 2003, Fíggjarmálastýrið.**

11. **Årsberetning 2003, Danmarks Pædagogiske Universitet.**

12. **Turið Sigurðardóttir: Bókmentasøgur, Greinasavn. Føroya Fróðskaparfelag 2004. Hon fekk stuðul til útgávuna úr *Grunni Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* í 2003.** (J.nr. 0073-01087).

Frágreiðing: Annika Sølvará